# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Búskaparstøðan

Nýggjasta frágreiðingin frá Búskaparráðnum mælir til, at landið tálmar konjukturunum.

Búskaparráðið nevnir eina endurskoðan av rentustuðulin fyri sethúsalán og setir spurnartekin við signalvirðið í skattalættanum, sum er partur av samgonguskjalinum. Harafturat mælir Búskaparráðið til betri stýring av kommunalum íløgum.

Rentustuðulin kom fyri at eggja og hjálpa fólki at seta føtur undir egið borð. Tó mugu vit staðfesta í dag, at hann er eitt dýrt tiltak. Politiski viljin tykist tó ikki vera fyri at avtaka rentufrádráttin nú, men ein loysn kundi kanska verið at ásett eitt moderat mestavirði fyri lán, sum rentufrádráttur kundi verið latin fyri, ella niðurtrappað yvir eitt áramál.

Hitt málið við skattalættanum er ikki minni politiskt eymt, tí at skattalættin er partur av samgonguskjalinum, sum trupult verður at koma uttanum hjá samgonguflokkunum, hóast fleiri helst einki høvdu ímóti at broytt ætlaða lættan.

Føroyingar eru ikki so væl fyri, at man kann økja skattin. So mikið má standa fast. Hóast góð ár og methøgar inntøkur, so er framvegis hart hjá ungum fólkum at fáa endarnar at røkka saman við húsum, børnum og høgum livikostnaði. Tað skerst ikki burtur, at Føroyar er eitt av heimsins dýrastu londum at búgva í, og tað sæst eisini á húsarhaldsbudgettinum hjá fólki.

Trupulleikin við kommununum er, at man politiskt ynskir at leggja størri ábyrgd út til kommunurnar. Hetta sampakkar neyvan við ynskið um at økja sentralu stýringina av, hvat kommunur kunna og ikki. Annaðhvørt hevur man frá landsins síðu álit á kommununum, ella hevur man ikki álit á teimum. Borgarnir kunnu ikki vera tjentir við, at landið leggur sentral øki sum eldrarøkt út til kommunur, sum sama land ikki hevur so mikið av áliti á, at lata tær avgera sjálvar, nær íløgur skulu gerast. Her mugu landspolitikarnir taka eina avgerð.

At Búskaparráðið rópar varskó, er eitt gott høvi at hyggja at, hvussu vit kundu hildið almennu útreiðslunum og almenna forbrúkið niðri, og harvið køla búskapin eitt sindur. Hvussu nógv kostar innkrevjingin av hvørjari krónu í skatti? Hvussu nógv kostar umsitingin av t.d. sjúkrahúsverkinum gjøgnum øll lið í umsitingarketuni per sjúkrasong? Hvat fáa vit fyri skattin? Hvat fyri incitament gevur tað teimum, sum ynskja at virka og liva í Føroyum, men annars eru mobil?

**Sosialurin**

## Meiningsmyndarar ella bíligt undirhald

**REIDAR NÓNFJALL**



Vit í Føroyum virka í einum samfelag og í einari verð við nógvum informatiónum, sum kunnu verða við til at skapa fortreytir fyri øktum effektiviteti, øktum produktiviteti og skjótari menning – vit í Føroyum eru á veg frá einum veiðisamfelag til eitt informatiónssamfelag. Informatiónir verða útvegaðar umvegis miðlar sum sjónvarp, útvarp, bløð, internet o.a. Tað, sum vit eisini uppliva í stóran mun, er eitt kaos av informatiónum og meiningum, og har tey, sum føra seg fram alment, ikki megna at skapa greiðar boðskapir og seta mál, tosa mest sína egnu egoistisku søk, royna at villeiða, tosa abstrakt ella óítøkjuligt o.a.

Í øllum hesum informatiónskaos er sera neyðugt við vitanarpersónum og meiningsmyndarum, tvs. persónum, sum kunnu draga samanum, koma við røttum, undirbygdum og greiðum boðskapum og soleiðis lyfta seg og okkum burturúr kaos og bíligum undirhaldi av øllum slag.

Tað er grundleggjandi munur á informatión og vitan. Vitan fæst við dátaviðgerð, analysum av informatiónum, nógvari nýtslu av tíð, peningi og orku o.a. – strategisk vitan er virðisskapandi uppá ymiskar mátar. Vantandi vitan sæst aftur í teimum nýggjheitum, sum verða borðnar okkum dagliga - tær eru vanliga útvegaðar skjótt og verða viðgjørdar yvirflatiskt, heildin kemur ikki við, ongin dýbd og eru mangulfullar. Vit gerast tí oftast ikki klókari ella betri fyri av tí vit hoyra og síggja umvegis fjølmiðlarnar – vit gloyma eisini tíðindini ógvuliga skjótt og ongi mørk verða flutt. Harafturat hevur tann nógva informatiónin vit fáa, lutfalsliga avmarkaðar handlingar við sær og lítið og onki fær avleiðingar orsaka av informatión – hetta er serliga galdandi innan politiska skipanina í Føroyum. Eisini uppliva vit endurtøkur og aftur endurtøkur av somu informatiónum.

Teir meiningsmyndarar, sum royna seg í Føroyum eru mest politikarar og religiøs fólk. Tað er í alt ov lítlan mun vinnulívsfólk og leiðarar, sum bera fram sínar meiningar, trupulleikar og vísa á loysnir. Tað, sum eisini eyðkennir meiningsmyndarí í Føroyum er, at flestu meiningsmyndarar bara koma fram í sambandi við einstøk primitiv og lætt atkomulig mál og nærmast balladumakarí. Vit hava snøgt sagt ongar meiningsmyndarar, sum arbeiða pro-aktivt (uppá forkant) ella leiða samfelag og vinnu inn í framtíðina – nakrir politikarar royna kortini, men uttan neyðuga førleikan og royndirnar. Í hesum sambandi er eisini lívsneyðugt at brúka informatiónir til at siga sannleikan og gerast tilvitað um okkara veruligu trupulleikar, so vit finna bestu loysnirnar og varðveita okkara demokrati og møguleikar fyri menning.

Spurningurin er so, um vit framhaldandi skulu verða undirdýkt av onkisigandi informatiónum og meiningsloysi, slúka allar informatiónir rátt og ókritiskt. ella okkum tørvar kompetentar meiningsmyndarar at byggja samfelag, vinnu og borgarar upp við dygdargóðari vitan. Verður politiska og vinnuliga arbeiðslagið ikki broytt frá nú av, so megna vit ikki at koma víðari frá einum veiðusamfelag, informatiónssamfelag og til eitt vitanarsamfelag við framburði og menning.

## Glantrileikur fólkafloksins

**FRANK DAVIDSEN**



Í skjótt 10 ár hevur fólkaflokkurin sitið við flogvallarmálinum og eingin ivi er um, at stóð tað til sitandi landsstýrismann, so var útbyggingin av Vága floghavn ongantíð loyst úr hafti.

Ein kann siga, at táverandi landsstýrismaður fólkafloksins veruliga saboteraði útbyggingina av Vága floghavn, tá hann kravdi at danir skuldu gjalda.

Bragdi, ið sitandi løgmaður gjørdi við at loysa málið, er kanska nógv størri enn vit geva okkum far um.

Tí eingin sum helst ivi er í míni sál, at tók løgmaður ikki um endan nú, so var eingin útbygging av Vága floghavn farin fram í hesum valskeiði.

Vit kunna bert ímynda okkum um hvørjar avleiðingar tað hevði havt fyri Vága floghavn, um samgongan frá 1998-2002 tók við aftaná komandi løgtingsval og málið ikki varð loyst. Øll 8 umboð tjóðveldisfloksins standa sum ein maður ímóti útbygginigini av Vága floghavn, sostatt kundi sitandi landsstýrismaður hildið áfram við at lagt fótonglar fyri Vága floghavn.

Úrslitið ella grundgevingarnar høvdu tá verið at nú var komið so langt áleiðis við kanningunum og projektering av nýggjum flogvølli, at tær 30 mill. kr. sum ætlanin var at nýta til Vága floghavn, samfelagsliga loystu seg betur at nýta til »nýggja flogvøllin«.

So fólkaflokspolitikkarar haldið uppat við at profilera tykkum við útbyggingini av Vága floghavn, tí sum Haldur Hansen, sáli segði, kundi flogvøllurin rullast saman, so var hann fluttur úr Vágum fyri langari tíð síðani.

Hinvegin so var tað eitt sætt bragd, at sitandi løgmaður uttan hovasták fekk loyst málið.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.